Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 30.03.2023 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar:** | | | |
| 17/23 | 23/00146-1 | Gøta frá Mataránni út á Støð matr. nr. 327 í Syðrugøtu | 3 |
| 18/23 | 23/00155-2 | Tilmæli og frágreiðing - 23/00155 | 5 |
| 19/23 | 23/00157-2 | Broyting av byggisamtykt og býarplan í Syðrugøtu - Part av matr. 199a | 7 |
| 20/23 | 23/00053-3 | Kappróðrarneyst í Norðragøtu | 8 |
| 21/23 | 23/00141-1 | Broyting av byggisamtykt og býarplani í Norðragøtu matr. 86ay og 86ax | 9 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar:**

## 17/23 Gøta frá Mataránni út á Støð matr. nr. 327 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 27.03.2023 | 4/23 | 23/00146-1 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.03.2023 | 6/23 | 23/00146-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 28.03.2023 | 16/23 | 23/00146-1 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 17/23 | 23/00146-1 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur arbeitt við at gera eina gongugøtu framvið strondini, frá Júksnará og út á Støð í Syðrugøtu.

Ætlanin hjá kommununi er at gera tað møguligt at ferðast frá Syðrugøtusandi og út til bátahylin í Syðrugøtu og samstundis at fjala kloakkrør o.a. í eru fest á verandi brimgarð.

Hendan ætlanin er partur av verandi fríðkan í økinum og kemur at binda tvey økir saman.

Umsitingin hevur fingið ráðgeva at gera útbjóðingartilfar og er hendan ætlanin nú klár at bjóða út. Í hesum útboðnum er betong- kloakk- og el arbeiði.

Sí Skjøl í málinum

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til, at bjóða arbeið út. Tá  tilboðini eru komin inn og endaligi kostnaðurin fyriliggur verður hetta lagt fyri býráði til endaliga støðutakan.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. marts 2023**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum.

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 27. mars 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Fíggjarnevnd 28. mars 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Býráðið 30. mars 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 18/23 Tilmæli og frágreiðing - 23/00155

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.03.2023 | 20/23 | 23/00155-2 |
| 2 Býráðið | 30.03.2023 | 18/23 | 23/00155-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 30.03.2023 | 21/23 | 23/00155-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir íløgur fyri í 2022. Sambært hesum verður neyðugt at veita eykajáttan á 7.325.000,00. Talan eru um arbeiði, sum eru farin í gongd í 2022, men sum ikki verða gjørd liðug fyrrenn í 2022.<br><br>Á fíggjarætlanin fyri 2023 eru 1.650.000 kr. avsettar til arbeiðið at víðka kirkjugarðin í Leirvík. Ætlanin var at hetta arbeið skuldi verða gjørt yvirr 3 fíggjarár og skuldi verða liðugt í 2024, men arbeið verður ligugt í ár og tískil verður neyðugt at veita eina eykajáttan á 850 t.kr til hetta. Samlaði kostnaðurin verður tó ikki hægri enn samtykt.<br><br>Eingir pengar eru avsettir til gøtuljós (íløgur), men neyðugt verður at keypa nakað av nýggjum ljósum/steyrum og tí verður neyðugt at veita eina eykajáttan til hetta á 250 t.kr.<br><br>Samlaðu eykajáttaninar veða sostatt 8.425.000,00 kr.<br><br>**Ískoyti 29. Mars 2023**<br>Umframt omanfyri standandi verður neyðugt at veita eykajáttan á 1.050.000,00 til útstykkingina í Fløtugerði í Leirvík. 450 t.kr av hesum vóru avsettaa á fíggjarætlanini í 2022, men samlaði kostnaðurin av útstykkingini verður 600 t.kr hægri enn avsett, og tí verður eykajáttanin í 2023 uppá 1.050.000,00 kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Samlaða úrslitið (RLÚ) verður 8,4 mió lægri enn á samtyktu fíggjarætlanini fyri 2023. Gjaldføri og ein møgulig lántøka verður tó bert ávirkað av eykajáttanini til kirkjugarðin og gøtuljós, tí rest eru íløgur sum verða fluttar frá 2022 til 2023. Meirinntøkan higar til í ár er hægri enn eykajáttanin til kirkjugarðin og gøtuljós, og tí kemur hetta heldur ikki at ávirkað endaliga úrsliti fyri 2023 sum nú er. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan á 8.425.000,00 kr. , og at peningurin verður tikin av innistandandi.<br><br>**Ískoyti 29. Mars 2023**<br>Mælt verður til at veita eykajáttan á 9.475.000,00 kr. , og at peningurin verður tikin av innistandandi. |

**Fíggjarnevnd 28. mars 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og veita eykajáttanir á íalt 8.425.000,00 kr.

**Fíggjarnevnd 30. mars 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum, og veita eykajáttanri á íalt 9.475.000,00 kr.

**Býráðið 30. mars 2023**
Einmælt samtykt at taka undr við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 19/23 Broyting av byggisamtykt og býarplan í Syðrugøtu - Part av matr. 199a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.03.2023 | 8/23 | 23/00157-2 |
| 2 Býráðið | 30.03.2023 | 19/23 | 23/00157-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Fyri at tillaga øki við Toftamørk til fjølbroytta bygging er um ynski at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 199a í Syðrugøtu frá B2, Bústaðarbygging við serstakari byggisamtykt til B1, Alternativ íbúðarbygging. Sí skjal í málinum.<br><br>Fyri at kunna fremja hesa ætlan verður mælt til at broyta part av matr. nr. 199a frá B2, Bústaðarbygging við serstakari byggisamtykt til B1, Alternativ íbúðarbygging. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at broyta omanfyri nevnda øki frá B2, Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt til B1, Alternativ íbúðarbygging. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. marts 2023**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum.

**Býráðið 30. mars 2023**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 20/23 Kappróðrarneyst í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 21.03.2023 | 12/23 | 23/00053-3 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.04.2023 | | 23/00053-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 28.03.2023 | 18/23 | 23/00053-3 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 20/23 | 23/00053-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Sí hjálagdu tekningar (Byggiprogram 25.01.2023) |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Kr. 2.000.000,- eru settar av til endamálið. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at taka støðu til, um arbeiðið skal setast í gongd. |

**Mentanarnevndin 21. mars 2023**
Mentanarnevndin mælir til at verkætlanin verður gjørd klár til útboð (tekningar, kostaðarmeting o.a.). Nevndin ynskir sær eisini eina neyvari gjøgnumgongd av tekningum og øðrum.

**Fíggjarnevnd 28. mars 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 30. mars 2023**
Einmælt samtykt at taka undir vð tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 21/23 Broyting av byggisamtykt og býarplani í Norðragøtu matr. 86ay og 86ax

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.03.2023 | 3/23 | 23/00141-1 |
| 2 Býráðið | 30.03.2023 | 21/23 | 23/00141-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Fyri at tillaga øki við Myllá til fjølbroytta bygging er ynski at broyta byggisamtyktina fyri økið í Norðragøtu matr.nr. 86ay og 86ax frá B2, Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt til B1, Alternativ íbúðarbygging.<br><br>Fyri at kunna fremja hesa ætlan verður mælt til at broyta matr.nr. 86ay og 86ax frá B2, Búsatðarøki við serstakari byggisamtykt til B1, Alternativ íbúðarbygging. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður at broyta omanfyri nevnda øki frá  B2, Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt til B1, Alternativ íbúðarbygging. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. marts 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum.

**Býráðið 30. mars 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

fundurin lokin kl.19.00

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen